# Umhvørvi og orka avloysa olju

NAVNABROYTING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



Undir orðaskiftinum á tingi herfyri vóru røddir frammi um at broyta navnið á Oljumálaráðnum til Umhvørvisráðið ella Umhvørvis- og Orkumálaráðið. Ein av forsprákarunum fyri hesi broyting var Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, sum helt fyri, at nú eingin olja enn er funnin og nú eitt nú umhvørvismálið eigur at fáa enn størri raðfesting enn tað hevur í dag, so hevði ikki verið meira enn rímuligt at broytt navnið á Oljumálaráðnum.

– Umhvørvið er ein tann mest viðkomandi spurningur og málsøki fyri framtíðar Føroyar.

Tað kann undra okkum, at vit í so langa tíð hava brúkt so lítla orku uppá henda sera viðkomandi spurningin, sum eitur umhvørvi, og sertakliga tá hugsað verður um hetta lítla og vakra landið vit búgva í. Tað eru sera avmarkaðar upphæddir sum umhvørvið fær á fíggjarlógini og tað kann ikki vera rætt fyri eitt land, har serliga havumhørvið hevur so stóran týdning segði

Jóannes Eidesgaard og helt fyri, at Javnaðarflokkurin vil vera við til at geva umhvørvinum eina munandi hægri politiska og fíggjarliga raðfesting enn hetta málsøkið higartil hevur fingið. Og hann legði aftrat: – Tað er víst, at eitt komandi ættarlið, tvs. tey ungu, fer at raðfesta hesi málsøki sera høgt. Hesi hava líkasum hug at hugsa eitt sindur longur.

Formaður Javnaðarfloksins helt tað eisini vera uppá hægsti tíð, at orkupolitikkur verður eitt politiskt viðkomandi mál og vísti á, at tað er ongantíð í Føroyum verið defineraður ein orkupolitikkur. Man hevur latið ein interkommunalan felagsskap sum SEV taka sær av orkuni fult og heilt stórt sæð. At útgreina og siga, hvat tann rætti orkupolitikkurin skal vera framyvir. Í øllum øðrum londum er tað soleiðis at man politiskt hevur nakrar meiningar um, hvat slag av orku man eigur at raðfesta fremst.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður var í viðgerðini av málinum á tingi sera fegin um, at áhugi er fyri at raðfesta umhvørvið hægri. Hann helt tað vera rætt at umhugsa at broyta navnið á Oljumálaráðnum, nú bæði havumhvørvi og umhvørvi og náttúra sum heild liggja undir sama ráð. Tað kann tí væl vera, at hetta er rætta løtan til at broyta navn til Umhvørvis- og orkumálaráð.

– Men hetta má ikki tulkast sum at vit hava mist vónina til at finna olju. Tað vita vit av góðum grundum ikki enn. Men fyri at lyfta um týdningin umhvørvið hevur, hevði tað verið rætt at umhugsa umrøddu broyting segði landsstýrismaðurin og helt fram: -Er tað nakað, sum kemur at geva okkum broytingar í framtíðini, so er tað umhvørvið. Eyðun Elttør helt eisini, at upphæddirnar til umhvørvið á fíggjarlógini eru ov smáar, tó at tað er broytt tann rætta vegin. –Við góðum stuðuli frá tinginum og frá landsstýrinum ber til at gera nakað gott fyri umhvørvið í Føroyum. Tað fer at gagna okkum og tað fer at geva okkum eitt gott ummæli úti í heimi.

Um vit sum stýra ikki ganga inn fyri at verja um umhvørvi, so fara vit at missa nógv segði Eyðun Elttør, sum eisini helt tað er uppá tíðina at broyta navnið á Oljumálaráðnum. Men tað er ikki tí at vit kanska ikki hava nakra olju fyrr enn um 10 ár, men vit mugu í hesum tíðarskeiðnum gera okkara fyri at halda oljufeløgini til her.






## Framgongdin í USA ávirkar um okkara leiðir

MARKNAÐARRÁK

Sum væntað, fyri viku síðani, varð farna vika stórliga ávirkað av roknskaparkunngerðum og bjørtum uppgerðum um støðuna í amerikanska búskapinum. Hesar uppgerðir staðfestu enn einaferð, at millum annað gongur betur á amerikanska arbeiðsmarknaðinum, har talið av teimum sum fyri fyrstu ferð søkja um arbeiðsloysisstuðul, er um at finna eina trygga legu. Sum áður nevnt hevur støðan á amerikanska arbeiðsmarknaðinum alstóran týdning fyri búskapin í USA. Hesin búskapur er heimsins størsti, og støðan í USA ávirkar sostatt stórliga búskaparliga umhvørvið um okkara leiðir.

Fleiri týdningarmiklir roknskapir vóru kunngjørdir í farnu viku. Hóast onkur var vánaligur ella verri enn væntað, vóru meginparturin av roknskapunum góðir og betri enn væntað. Millum virkini, sum kunngjørdu góð tíðindi ella bjartir roknskapir, vóru millum annað Intel, Cisco, Motorola, General Motors og Samsung. Hinvegis vóru tíðindini frá eitt nú Apple og IBM ikki so bjørt.

Teir sum heild bjørtu roknskapirnir og góðu búskaparligu uppgerðirnar virka til, at partabrævamarknaðirnir og lánsbrævarenturnar sum heild hækkaðu í farnu viku. Av tí at hetta varð gongdin fleiri dagar á rað, kom ein mótrørsla fríggjadagin, tá partabrøv og lánsbrævarentur fullu nakað aftur.

Av tí at færri búskaparligar uppgerðir verða kunngjørdar hesa vikuna, sammett við farnu viku, verður vikan í størri mun ávirkað av roknskaparkunngerðum. Var farna vika týdningarmikil á hesum økinum, verður hendan vikan ikki minni týdningarmikil. Ein munur er kortini, at hesa vikuna kunngerða eisini fleiri norðurlendsk virkir roknskap. Nøkur av hesum eru Norsk Hydro, Electrolux og Volvo. Umframt hesi kunngerða eisini týdningarmiklu virkini Texas, Daimler Chrysler, AT&T og Microsoft roknskap.

Marknaðarrák metur, at roknskapirnir og metingarnar hjá virkjunum, ið verða kunngjørd hesa vikuna, fara at fylgja rákinum frá farnu viku. Sostatt er væntað, at meginparturin av kunngerðunum verða góðar og fara aftur at hava positiv árin á virðisbrævamarknaðarnar. Atlit skal tó takast til, at partabrævamarknaðirnir og lánsbrævrenturnar eru hækkaðar heilt fitt seinastu vikurnar, og at hetta tískil kann føra við sær vinningsstaðfesting av partabrøvum og keypsáhuga av lánsbrøvum. Sannlíkt er við øðrum orðum, at mótrørslan frá fríggjadegnum kann halda áfram hesa vikuna. Ein óstøðug vika kann tí væntast.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,84% | 2,94% |
| 5 ára lánsbræv | 3,78% | 0,10% |
| 10 ára lánsbræv | 4,52% | 0,06% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 258,7 | 1,8% |
| OMX, Svøríki | 609,7 | 0,7% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.523,7 | -0,5% |
| S&P 500, USA | 1.039,3 | 0,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,35 | -0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 163,52 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 71,06 | 0,5% |
| Altjóða Partabrøv | 74,12 | 1,8% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 636,85 | 0,3% |
| EUR | 743,03 | 0,0% |
| GBP | 1.067,86 | 1,0% |
| NOK | 89,90 | -0,2% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Sakna bústaðir við hugsjónum

**Tey menniskjaligu viðurskiftini vanta, sigur Arkitektafelag Føroya í viðmerking til aðalorðaskiftið, sum løgtingið fer undir í dag. Fíggjarligu loysnirnar eru í fokus, men arkitektarnir sakna eina meining um, hvussu vit skulu búgva í Føroyum næstu 50 árini**

BÚSTAÐIR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*


*Lutaíbúðir er loysunarorðið, men arkitektar sakna, at byggifaklig og sosial atlit verða tikin við í ein almennan bústaðarpolitikk*

Tað er lítið at síggja til alternativa bústaðarbygging í álitinum »Alternativ bústaðarbygging«.

Tað heldur Arkitektafelag Føroya, ið hevur havt evnisfund um álitið, sum er grundarlagið undir aðalorðaskiftinum hjá løgtinginum í dag. Fleiri avgerandi tættir vanta í álitinum, heldur felagið.

– Tað er ikki rætt at kalla álitið »Alternativ bústaðarbygging. Úr innihaldinum er lítið um alternativar bústaðir, men mest um framtíðina hjá Húsalánsgrunninum. Felagið hevði vónað, at tað vóru tey menniskjaligu viðurskiftini, sum vóru í miðdeplinum. Tað er umráðandi, at vit gera okkum greitt, hvussu vit vilja búgva í framtíðini, sigur Rúni Abrahamsen, formaður í Arkitektafelag Føroya.

Arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt álitið um alternativa bústaðarbygging er mannaður við embætisfólkum. Hann hevur av tíðarneyð onki gjørt við setningin, sum álegði honum »at finna útav, hvørji sosial atlit skulu takast í sambandi við alternativa íbúðarbygging«. Tað harmast Arkitektafelag Føroya um og vónar, at landsstýrismaðurin fær sett hetta evnið á skránna, so hesin umráðandi parturin eisini verður lýstur.

Arkitektafelagið hevur í fleiri ár sóknast eftir einum almennum bústaðarpolitikki, sum skal slóða fyri góðum og fjølbroyttum bústaðum. Nú álitið mest snýr seg um fíggjarviðurskiftini er felagið vónbrotið, tí tað gevur álitinum eina slagsíðu. Arkitektarnir vóna tó, at politikarar fara at skifta orð um, hvussu føroyingar grundleggjandi skulu búgva komandi 50 árini. Hvat ynskja vit, og hvat vilja vit sleppa undan, spyrja arkitektarnir.

Bústaðarmynstrið í Føroyum er ov einstáttað, staðfestir Arkitektafelagið, og tað broytist ikki, fyrr enn ymisku bústaðarskipanirnar verða javnsettar fíggjarliga. Frítøka fyri meirvirðisgjaldi, rentustuðulin og at summar kommunur selja byggibúgvin grundstykki fyri undirprís er ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging, sum alternativir bústaðir ikki fáa lut í.

Arkitektafelagið saknar politiskt fyritakssemi, tí føroysk bústaðarbygging er lítið ment tey seinastu árini. Hóast vit byggja fyri milliardir, er einki er gjørt fyri at kanna og menna bústaðarbyggingina, og ov lítið verður gjørt fyri at byggja á royndirnar, sum eru gjørdar, bæði vánaligar og góðar.

– Bústaðarbyggingin skal vera fjølbroytt og liðilig. Tann tørvur, sum vísir seg í dag, er ein annar um 25 ár, sigur Arkitektafelagið, sum heitir á politikarar um at orða ein bústaðarpolitikk, sum eisini tekur byggifaklig og sosial atlit. Tástaðni fáa vit bústaðir við hugsjónum, heldur Arkitetkafelagið, ið bjóðar seg fram at vera við í arbeiðnum at fáa betri bústaðir til øll.

### Øll nevndin afturvald

Eingin broyting var í nevndini fyri Arkitektafelag Føroya, tá felagið hevði aðalfund 3. oktober 2003. Nevndin, sum hevur sitið seinastu trý árini, varð afturvald. Í henni sita Rúni Abrahamsen formaður, Albert Isfeld kassameistari og næstformaður, og Magnus Magnussen skrivari.

Arkitektafelag Føroya fer í næstum at skipa fyri eini framsýning um "Burðardyggan arkitektur". Hetta er ein framsýning, sum fyrstu ferð var sýnd fram á norðurlendsku sendistovunum í Berlin fyri einum ári síðan. Framsýningin hevur síðan verið runt í Norðurlondum

Arkitektafeløg í Norðurlondum eru farin undir eina miðvísa eftirútbúgving av projekterandi arkitektum. Arkitektafelag Føroya metir, at tað er umráðandi og neyðugt framhaldandi at eftirútbúgva seg. Felagið hevur tí tikið táttin upp og fer eftir sama leisti sum hini norðurlondini tey komandi tvey árini at skipa fyri eftirútbúgvingarskeiðum fyri projekterandi arkitektar.

# Lutaíbúð lykilin til bústaðarloysn

**Smærri íbúðir til eldri fólk. Tað er høvuðsinnihaldið í alternativu bústaðarbyggingini, sum Bill Justinussen landsstýrismaður leggur upp til, nú løgtingið hevur aðalorðaskifti um bústaðarbygging í dag. Húsalánsgrunnurin fær ein týðandi leiklut, um tað verður, sum landsstýrismaðurin ynskir**

BÚSTAÐARBYGGING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Eingi tilboð eru til eldri fólk, sum vilja flyta úr egnum stórum húsum í ein minni bústað.

Tað er størsti bústaðarpolitiski trupulleikin í Føroyum, staðfestir Bill Justinussen, landsstýrismaður. Hann hevur lagt upp til aðalorðaskifti um alternativan bústaðarpolitikk, sum verður í løgtinginum í dag.

Orðaskiftið byggir á eitt álit um alternativa bústaðarbygging, sum er fyrsta samlaða lýsingin av bústaðartørvinum í Føroyum. Kannað er, hvør tørvurin á alternativum bústaðum er. Meira enn helvtin av teimum yvir 60 ár, sum vórðu spurd í einari Gallup-kanning, segði, at teirra hús vórðu ov stór. Nærum triði hvør av teimum millum 50 og 60 ár segði, at húsini vórðu ov stór. Í hinum endanum svaraðu umleið 15 prosent í aldursbólkinum 20 til 40 ár, at teirra bústaður var ov lítil.

Bill Justinussen sigur tølini vísa, at bústaðarpolitisku átøkini mugu vendast ímóti at skapa neyðugar karmar fyri bygging av smærri bústøðum. Á tann hátt kunnu fleiri bústaðartilboð fáast til vega til eldri fólk, sum búgva í stórum húsum og fegin vilja flyta í ein minni bústað.

Kanningarnar vísa eisini, at meirilutin av hesum eldru fólkunum búgva í húsum uttan skuld, og tey hava sostatt eina góða keypiorku, stendur ein nøktandi bústaður teimum í boði. Flyta tey eldru úr sínum stóru húsum, verða fleiri hús tøk á marknaðinum til tann bólkin av yngri fólkum, ið siga seg búgva í ov lítlum bústaði.

#### Keypa og leiga

Lykilin til eina loysn er lutaíbúðir, sigur Bill Justinussen. Hetta er ein loysn, sum liggur ímillum eigarabústað og leigubústað. Eitt lutaíbúðarfelag er skipað á tann hátt, at fólk keypa ein lut í felagnum, sum svarar til ein bústað, og síðan gjalda tey eina mánaðarliga leigu til felagið, sum sjálvt ásetir kostnaðin.

Fyrimunurin við hesum eigarahættinum er, at íbúðin gerst bíligari at sita í enn eini sethús, og tí krevst ikki so nógvur peningur til at seta føtur undir egið borð, sigur Bill Justinussen.

Við lóg skulu karmarnir ásetast fyri, hvussu lutaíbúðafeløgini kunnu virka. Landsstýrismaðurin heldur tað eisini hava týdning at gera fyriskipanir, sum tryggja dygdina í slíkari bústaðarbygging.

#### Skyldur uttan játtan

Spurningurin er so, hvussu nýggja bústaðarmynstrið skal fíggjast. Í hinum norðurlondunum er tað almenna í størri mun partur av loysnini, og Bill Justinussen heldur, at besta loysnin fyri Føroyar er at leggja íbúðargrunnin og Húsalánsgrunnin saman og gera tann endurskipaða grunnin til almenna bústaðarpolitiska amboðið.

Stóru peningastovnarnir hava fýlst á, at almenni peningurin í Húsalánsgrunninum fór at avlaga kappingina á bústaðarmarknaðinum, og at tað tí ikki var rætt, at Húsalánsgrunnurin fær einkarætt at fíggja alternativa bústaðarbygging. Talan verður ikki um kappingaravlaging, ger landsstýrismaðurin púra greitt.

– Húsalánsgrunnurin fær ikki nakra játtan á fíggjarlógini, men fær kortini nakrar skyldur, sum peningastovnarnir ikki hava. Tær verða ásettar í endamálsorðingini. Tað er heldur ikki ætlanin, at Húsalánsgrunnurin skal fáa einkarætt at fíggja alternativa bústaðarbygging. Tað stendur øllum fíggjarstovnum í boði. Sostatt eru tað heldur peningastovnarnir, sum hava ein kappingarfyrimun fram um Húsalánsgrunnin, tí teirra virksemi er ikki bundið á sama hátt, sigur Bill Justinussen.